# KÍF gjørdi fyrsta vørrin

**Føroyameistararnir úr ÍF máttu óvæntað taka til takkar við tapi í dystinum móti KÍF**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Kvinnurnar úr Kollafirði tykjast hava slept øllum tosi um botnstríð, og leygardagin vunnu tær á føroyameistar-unum úr ÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Flogbóltslandskappingin fór í gongd um vikuskiftið, og longu fyrsta umfarið var okkurt úrslit, sum fekk onkur eygnabráð fram hjá flogbóltskønum.

Ikki tí. KÍF hevði longu í Fleyr-kappingini prógvað, at tær helst fóru at vera nakað drúgvar í ár, tá tær leiktu seg fram til finaluna, og leygardagin sýndu tær so enn einaferð, at tær ikki skulu roknast sum dumpikandidatar í ár.

Á heimavølli tóku tær ímóti meistarunum úr ÍF, og tað var heimaliðið, sum dróg longra stráðið, tá avtornaði. ÍF var annars liðið, sum kom best frá byrjan, men eftir at tær høvdu tikið sær av fysta javna settinum, var tað KÍF, sum setti dagsskránna. Tey bæði næstu settini vóru bæði jøvn men tá KÍF vann hesi bæði, tóktist mótstøðan vera farin. Seinasta settið endaði við tryggum 25-17, og so var fyrsta lítla sensatiónin greið.

Í hinum báðum dystunum í meistaradeildini hjá kvinnum gekk tað meira eftir ætlan, um so skal sigast. Á Giljanesi var TB á vitjan, og her gjørdist talan um tryggan 3-0 sigur. 3-0 var somuleiðis úrslitið á Klaksvik, har Mjølnir tók ímóti Fleyr.

Komandi vikuskifti eru aftur tríggir dystir á skránni, og tað er ikki frítt, at úrslitini um vikuskiftið hava givið sítt íkast til at skapa spenning um teir dystirnar. Hesa ferð fær KÍF vitjan av TB, og einki er at ivast í, at hetta er ein dystur, sum fer at geva eina ábending um, hvørjar vónir KÍF skal seta sær fyri árið. Í Fuglafirði skal ÍF royna at reisa seg, tá Mjølnir kemur á vitjan, og so líkist tað eini botnuppgerð, tá Dráttur fer til Havnar, har Fleyr tekur ímóti.

### Bert ein dystur

Hjá monnunum var bert ein dystur leiktur hetta vikuskiftið. Eftir skránni skuldi talan annars verið um tveir dystir, men hond- og flogbólturin fekst ikki at passa saman í Hoyvíkarhøllini, og so máttu Fram og ÍF gera av at útseta dystin.

Tað gjørdist talan tó ikki um í Klaksvík, har Mjølnir tók ímóti Fleyr. Og eins og hjá kvinnunum, so gjørdist talan um tryggan sigur til heimaliðið. Fleyr er framvegis í holt við setningin um at byggja sær eitt nýtt lið upp, og tó at Mjølnir ikki hevði sítt sterkasta fólk við hendan dystin, so gjørdist talan um 3-0 sigur. Fleyr var annars heilt nær við fyrsta settið, men eftir at Mjølnir vann hetta við 26-24, var líkasum greitt, hvønn vegin tað bar.

Komandi vikuskifti skulu tveir dystir leikast. SÍ fer á vitjan hjá Fleyr, og einki er at ivast í, at Sørvingarnir her vilja prógva, at tað ikki var av tilvild, at teir endaðu fremst í FK-kappingini hjá Fleyr. Og á Kambsdali verður satt brak, tá Mjølnir kemur á vitjan hjá ÍF. Dystirnir millum hesi bæði liðini hava verið sera undirhaldandi seinnu árini, og spurningurin tykist tí vera, hvat teirra er betri fyri í ár.



*Í Klaksvík var ongantíð spenningur, tá Fleyr vitjaði Mjølnir. Heimaliðið vann tveir tryggar 3-0 sigrar, og gestirnir vóru ongan tíð nær námind av at skapa nakran sum helst spenning*
*Mynd: SáH*

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 76 | 50 | 26 | 6 |
| 2 VÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 61 | 61 | 0 | 4 |
| 3 Stjørnan | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 71 | 60 | 11 | 3 |
| 4 StÍF | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 43 | 39 | 4 | 3 |
| 5 Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 54 | 40 | 14 | 2 |
| 6 Søljan | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 28 | 44 | -16 | 0 |
| 7 Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 39 | 78 | -39 | 0 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 58 | 56 | 2 | 3 |
| 2 Neistin | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 56 | 54 | 2 | 3 |
| 3 VÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 54 | 48 | 6 | 2 |
| 4 KÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 28 | 26 | 2 | 2 |
| 5 StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 24 | 26 | -2 | 0 |
| 6 H71 | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 50 | 60 | -10 | 0 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 3 KÍF | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 4 ÍF | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 5 Fleyr | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 6 Dráttur | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 SÍ | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 ÍF | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 Fram | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 Fleyr | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |



# Todi er ótolin

**Føroyski álopsmaðurin í FCK tykist ikki vera nøgdur um, hvussu viðgerðin av skaðanum hjá sær fer fram**

ÚTISETI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At stjørnurnar í útlendskum feløgum av og á geva eitt gleps umvegis fjølmiðlarnar, er sum so einki nýtt. Tað nýggja í hesum tykist hinvegin vera, at Todi Jónsson nú av álvara tykist hava fingið munnin á glið.

Í øllum førum hevur hann umvegis danska BT givið ilt av sær, tí hann ikki er nøgdur við háttin, sum FCK hevur viðgjørt skaðan hjá sær. Ein skaði í lærkrikanum, sum higartil hevur hildið álopsmanninum úti í tríggjar vikur.

– Eg dugi ikki at skilja, hví eg skal bíða í tíggju dagar eftir at fáa eina scanning gjørda, tá tað samstundis tykist eitt sindur ógreitt, júst hvat slag av skaða talan er um, sigur Todi Jónsson við BT.

– Fysiuterapeutarnir hjá okkum siga, at talan ikki er um nakran vøddaskaða. Altso ikki nakað tæðraslit ella líknandi, men annars duga teir ikki at siga nakað. Kanska er tað ein spurningur um pengar, soleiðis at FCK ikki vil gjalda fyri hetta. Tað havi eg so varhugan av, ljóða bombastisku útsagnirnar frá Toda í danska blaðnum.

### Er greiður um vandan

Slíkar útsagnir hava áður givið øðrum leikarum trupulleikar í felagnum. Serliga plagar ítróttarstjórin, Niels Christian Holmstrøm, at svara hart aftur, og tað er einki at ivast í, at Todi kann vænta sær okkurt aftursvar ein av komandi døgunum.

Hetta tykist Todi eisini at vera greiður um, men sambært blaðnum tykist hetta tó ikki vera nakað, sum nervar leikaran stórvegis.

– Tað kann væl vera, at hetta gevur trupulleikar, men eg eri ógvuliga frustreraður um gongdina í hesum. Eg kendi meg veruliga at vera væl fyri. Eg hevði spælt leingi uttan at hava trupulleikar av skaðum og formurin var í topp. Nú havi eg gingið tríggjar vikur uttan dyst, og tað kostar í so máta, sigur Todi, sum altso framvegis ikki veit, hvussu álvarsaman skaða talan er um.

Vit royndu at fáa orðið á Toda mánamorgunin, men hetta eydnaðist okkum tíverri ikki.



*Todi Jónsson er í øðini um, at hann enn ikki hevur fingið staðfest, hvat slag av skaða tað er, sum hann hevur fingið í lærkrikan*

# Kristian Sune suverenur

BILLARD

Sigursbygljan, sum frægi billardspælarin í Klaksvík, Kristian Sune Høgnesen, hevur riðið á nú í eina tíð, tykist ongan enda at fáa. Leygardagin var hann suverenur, tá hann endurvann stóru kappingina "Haldor Holm Cup". Hann var so nógv bestur, og tí verður spennandi at síggja, hvussu billardkekempan í Klaksvík fer at klára seg í føroyameistarakappingini fyri lið, sum byrjar í næstum.

Kristian Sune hevði besta meðaltalið, omanfyri 33 eygu, hann hevði besta einstaka spælið, omanfyri 900 eygu og hann hevði besta einstaka umfarið, omanfyri 200 eygu. So alt eydnaðist hjá billardspælaranum, sum í mong mong ár helt seg á einum 3. Til 4. Plássið í billard, men sum so knappliga tók allar á bóli, ikki bert einaferð men fleiri ferðir. Og tað sær út til at halda fram.



*Kristian Sune Høgnesen var fullkomuliga einaráðandi, tá árliga Haldor Holm Cup kappingin varð leikt um vikuskiftið*

Næstur honum gjørdist Ólavur Kjølbro, sum hevur víst seg at eiga sera góð evni í billard og heilt víst fer at menna seg nógv meira og kanska ein dag gerast verulig hóttan hjá meistaranum í Klaksvík. Gamli veteranurin Sonhard Johannesen, var aftur hesaferð í hølunum á teimum bestu og bleiv nr. 3. Ikki eydnaðist tað hesaferð einum av okkara frægu spælarum, Max Rasmussen at vinna Haldor Holm Cup.

## Einkultúrslit:

| | | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | Dystir | Eygu | Meðal | Nr |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sonhard | ### | 608 | 388 | 462 | 510 | 346 | 5 | 2314 | 23,14 | 3 |
| 2 | Bjarni | 362 | ### | 326 | 370 | 416 | 400 | 5 | 1874 | 18,74 | 5 |
| 3 | Max | 492 | 306 | ### | 286 | 316 | 362 | 5 | 1762 | 17,62 | 6 |
| 4 | Kristian Suni | 564 | 798 | 552 | ### | 922 | 492 | 5 | 3328 | 33,28 | 1 |
| 5 | Ólavur | 870 | 416 | 574 | 578 | ### | 360 | 5 | 2798 | 27,98 | 2 |
| 6 | Jens Kjartan | 424 | 652 | 452 | 370 | 366 | ### | 5 | 2264 | 22,64 | 4 |

**Teir fremstu**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kistian Suni Høgnesen | 3328 eygu |
| 2 | Ólavur Kjølbrgo | 2798 eygu |
| 3 | Sonhard Johannesen | 2264 eygu |

**Besta umfar**

| | |
|---|---|
| Kristian Suni Høgnesen | 210 eygu |